umhvørvisstovan

ELFELAGIÐ SEV
LANDAVEGUR 92
POSTBOX 319
110 TÓRSHAVN

Argir hin 26. november 2021
Málsnr.: 19/00160-49
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Katrin Haraldsdóttir Jensen

**Viðvíkjandi: Góðkenning av umsókn um at leingja tíðarfreistina fyri royndarverkætlan fyri sjóvarfallsorkuverk í Vestmannasundi**

Umhvørvisstovan góðkendi umhvørvisárinsmetingina fyri royndarverkætlanina við sjóvarfallsorkuverkum í Vestmannasundi tann 31. mars 2020, við ávísum treytum. Talan var um eina royndarverkætlan upp á í mesta lagi tvey ár.

Umhvørvisstovan hevur tann 22. apríl 2021 fingið umsókn frá SEV um at leingja tíðarfreistina fyri royndarverkætlanina við sjóvarfallsorkuverkum í Vestmannasundi frá 2022 til 2025. Grundgevingin hjá SEV er, at tað hevur gingið nakað striltið at koma í gongd, umframt at korona, hevur gjørt, at sjálvt royndararbeiði hevur verið styttri enn upprunaliga ætlað. Harafturat fekk SEV (vegna Minesto) eitt: **Royndarloyvi til framleiðslu av el úr sjóvarfalsorku í Vestmannasundi** frá Umhvørvisstovuni/Elveintareftirlitinum, sum er galdandi fram til 28. februar 2025. Fyri at samskipa øll loyvi og góðkenningar til verkætlanina, verður søkt um at leingja tíðarfreistina í góðkenningini av árinsmetingini, til somu endadagfesting sum royndarloyvi.

Í hesum samband bað Umhvørvistovan um at fáa frágreiðing um tær kanningar av hvali og kópi, sum vórðu gjørdar í 2020 sambært treytunum í góðkenningini. Umhvørvisstovan fekk hesa frágreiðing í juli 2021. Tann 27. oktober 2021 høvdu umboð frá Umhvørvisstovuni, SEV og Havstovuni ein fund um gongdina við royndarverkætlanini hagartil og um úrslitini av teimum kanningum sum Havstovan hevur gjørt í Vestmannasundi. Á fundinum kom fram, at SEV og Havstovan eru sinnað at halda fram við at samskipa tær kanningar, sum eru álagdar í treytunum í góðkenningini í longda royndartíðarskeiðinum.

**Hoyring**

Umhvørvisstovan sendi avgerðina til hoyringar hjá SEV tann 10. november 2021. SEV hevði onga viðmerking.

**Avgerð**

Umhvørvisstovan góðkennir at tíðarfreistin fyri verkætlanina verður longd til 28. februar 2025 og eru treytirnar í góðkenningini av umhvørvisárinsmetingini frá 31. mars 2020 galdandi fyri longda tíðarskeiðið. Av tí at tíðarskeiðið fyri royndarverkætlanina verður longt munandi, er niðanfyristandandi treyt løgd aftrat góðkenningini:

- SEV skal, tann 1. februar á hvørjum ári, senda Umhvørvisstovuni eina dagførda frágreiðing um tær kanningar í Vestmannasundi, sum eru álagdar í treytunum í góðkenningini av umhvørvisárinsmetingini.

**Kæruvegleiðing**

Henda avgerð kann kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum. Møgulig kæra skal sendast til Umhvørvisstovuna, sum sendur kæruna til landsstýrismannin við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er fýra vikur frá tí, at avgerðin er almannakunngjørd.

Suni Petersen, deildarleiðari / Katrin Haraldsdóttir Jensen, málsviðgeri